# Russar bjarga íslendska búskapinum

Russland er sinnað at læna Íslandi pening fyri at hjálpa landinum burtur úr fíggjarkreppuni. Russiska stjórnin er sinnað at veita íslendingum fýra milliardir evrur ella 680 milliardir íslendskar krónuri láni fyri at hjálpa Íslandi burtur úr fíggjarkreppuni. Tey boðini fekk nevndarformaðurin í íslendska Seðlabankanum frá russiska sendiharranum í Íslandi, Victor I. Tatarintsev, í morgun, skriva íslendsku bløðini. Sagt verður eisini, at Vladimir Putin, forsætisráðharri, hevur góðkent tilboðið, og at íslendsk umboð fara til Moskva í næstum at tiongast við russar um tilboðið. Sambært íslendskum bankakeldum skal russiska lánið millum annað brúkast til at styrkja íslendsku krónuna.



# Løgmaður hevur flutt kærumál frá Johan Dahl

Av tí at Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum hevur verið stjóri á Faroe Cold Stores í Vági, metir Vinnumálaráðið seg vera ógegnugt at vera við í eini klagu um hetta virkið. Tí hevur løgmaður gjørt av av at leggja kærumálið frá Vágs kommunu yvir avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovu um at taka aftur góðkenning hjá marknaeftirlitisstøðini í Vági til landsstýriskvinnuna í Innlendismálum at viðgera víðari. Málið snýr seg um, at væta frá slógvframleiðsluni hjá Faroe Cold Stores í Vági rann inn undir hurðina og inn á marknaeftirlisstøðina.

# eyðiliga sjúku



*Aftaná nøkur brádlig og løgin andlát millum føroysk børn, fekk týski barnalæknin Ulrike Steuerwald illgruna til CTD, sum hon eina ferð hevði upplivað í Týsklandi. Tá Jann Dávur varð innlagdur eina náttina í 1995 við somu sjúkueyðkennum, sum systurin var deyð av nøkur ár frammanundan, gjørdi Ulrike bart og setti hann beint í viðgerð, sum skuldi vísa seg at vera lívsneyðug fyri hann. Á myndini Jann Dávur saman við mammu síni Miriann Dam*



*Mestu tíðina var Oliva ein frísk og røsk genta. Men aftaná drúgva og pínifulla sjúkralegu andaðist hon tann 11. apríl 1988, bert trý ára gomul. Men fyri fýra árum síðan var tað staðfest, at veruliga deyðsorsøkin var CTD.*

Ríkissjúkrahúsinum, undir kønu hondini hjá Flemming Skovby, professara og ílegugranskara, sum hevur fylgt honum øll árini. Tí hevur Jann Dávur ongantíð verið í samband við føroysku barnalæknarnir.

## Familjan verður kannað

Um sama mundi, sum Jann Dávur fekk diagnosuna, hevði Ulrike eisini illgruna til aðrar føroyskar familjur, sum høvdu mist smá børn undir løgnum og greiðum umstøðum. Tí vóru allar familjurnar hjá teimum, sum vóru sjúk ella deyð av CTD, kannaðar. Tað vil siga foreldur og systkin. Og har vóru fleiri berarar og sjúk fólk avdúkað.

- Vit blivu øll kannað, og tað vísti seg, at eg og maðurin eru berarar. Tí er 25 prosent vandi fyri, at okkara børn hava sjúkuna, sigur Miriann Dam. Eldri sonurin, Christoffur, sum er 18 ár í dag, er eisini berari, men er annars púra frískur.

Í dag er Jann Dávur 13 ár, og hóast hann ikki orkar líka væl at rokast sum javnaldrarnir, livir hann eitt normalt lív. Bæði skúlin og sjúkan skulu røkjast væl, og fýra ferðir dagliga tekur hann heilivág. Harumframt kann tað vera lívshættisligt, um hann fær feitt at eta ella verður ovbyrjaður.

## Systurin nýliga kannað

Fyri fýra árum síðani varð deyðsorsøkin hjá Oliviu, dóttir Miriann og Jógvan kannað. Tá varð PKU-kortið funnið fram úr goymsluni á Statens Serum Institutt. Hetta er reglulig blóðroynd, sum hevur verið tikin av øllum nýføðingum síðan 1972. Har bleiv tað endaliga staðfest, at lítla gentan í veruleikanum hevði CTD, og at hetta var deyðsorsøkin. Men í 1988 var sjúkan enn ókend, og tí vistu læknarnir ikki, hvat teir skuldu leita eftir.

- Hóast vit innast inni vistu, at tað var hetta Olivia doyði av, so var tað ein lætti at fáa tað staðfest. Vit høvdu kanska hug at brigsla heilsuverkinum, tí vit onga frágreiðing fingu. Men nú funnu vit so deyðsorsøkina, sigur Miriann Dam í Kollafirði.

## Latið tykkum kanna

Miriann heldur, at allir føroyingar eiga at verða kannaðir fyri sjúkuna CTD, tí hon er so vandamikil, men løtt at staðfesta, viðgera og at liva við. Men hon roknar samstundis við, at um vaksin fólk hava CTD, so hava tey helst onkur sjúkueyðkenni, so sum manglandi orku og ein sveittaroyk av súrum landi, sum er sermerktur fyri hesar sjúklingarnar.

- Um sjúkan verður funnin í góðari tíð, kunnu sjúklingarnir liva normalt, sigur hon.


EB/Streymur

DULD DREPARA-SJÚKA Í FØROYUM

*Í blaðnum í gjár greiddu vit frá um duldu sjúkuna CTD, sum eini 30-40 føroyingar hava uttan at vita av tí. Sjúkan er deyðilig, um hon verður ikki staðfest ella viðgjørd. Nú heita serfrøðingar, læknar og avvarðandi á fólk, sum eru í familju við børn ella vaksin, sum brádliga doyðu, uttan nakra beinleiðis orsøk, um at lata seg kanna. Ein av hvørjum 1300 føroyingum hava sjúkuna, sum er nógv vanligari her enn aðrastaðni.*

FAKTA

## 30-40 sjúklingar í Føroyum

Síðan tilburðin við Jann Dáva hava læknarnir á Landssjúkrahúsinum fylgt málinum um CTD í Føroyum, eitt nú við at skriva greinir í vísundaligum tíðarritum. Tað vísir seg, at føroyingar eru nógv oftari berarar av CTD, enn fólk í øðrum londum. Roknað verður við at ein av hvørjum 18 føroyingum eru berarar. Hetta er gamla søgan við inngiftan og homogenum fólkabólkum. Eini 10 føroyingar eru longu kannaðir og settir í viðgerð, og vísindaligar kanningar vísa, at ein av hvørjum 1300 føroyingum, ella eini 30-40 fólk, longu hava sjúkuna uttan at vita av tí. Til samanberingar kunnu vit nevna, at í USA er títtleikin ein av 100.000 og í Japan ein av hvørjum 40.000.